DAGSINS MEINING

Alment og privat

Landst‡ri› hevur sagt, at ta› prinsipielt er í-móti almennari uppíblandan í vinnulívi› og sostatt ikki fær givi› ve›hald. Ve›hald er naka› man skal vera varin vi›, so miki› hava vit lært av f‡rsunum, men at útiloka, at eitt statsgaranti nakrantí› kann koma uppá tal, tykist at vera heldur bláoygt og er dupultmoralskt, tá ein hyggur at, hvat sitandi samgonga hevur avrika›. Ilt er at síggja, at ta› er meira liberalt og minni uppíblandan enn at veita eitt ve›hald, tá sitandi samgonga vi› einum fólkaflokslandsst‡rismanni á odda veitti rækjutrolarum skuldarsanering t.v.s. forerdi pening burtur til hesi skip. Eitt ve›hald n‡tist hóast alt ikki at gerast effektivt, sum ta› tildømis var vi› ve›haldinum Smyril Line fekk mi›skei›is í áttatiárunum, har láni› var› goldi› aftur.

Løgi› er, at menn ganga og fyrigykla sær, at man í Føroyum til allar tí›ir kann hava eitt vinnulív í menning, uttan nakran form fyri almennari uppíblandan. Um vit hyggja at søguni, so tra›ka›i Nationalbankin til, tá Kjølbro fór fallitt á sinni. Enn tann dag í dag eigur almenni Føroyagrunnurin JFK Trol. Hvat siga fólkafloksmenn til, at aktiviteturin hjá Kjølbro fyritøkuni var› trygglja›ur av tí almenna og hevur bjarga› mangum arbei›splássi í Nor›oyggjum? Var ta› skeivt av tí almenna at var›veita vinnuliga virksemi› í økinum? Meira n‡liga høvdu vit bankafallittini. Var ta› skeivt av Landst‡rinum at bjarga Sjóvinnubankanum og Føroya Banka og harvi› tryggja at nakrar av størstu vinnufyritøkum í landinum ikki mistu alt sítt innistandandi yvir 250.000 krónur? Var ta› skeivt at Framtaksgrunnurin var› settur á stovn og trygglja›i vinnuligt virksemi, har privata initiativi›, sum ikki einafer›, spældi fallitt?

Hvat sigur Vinnuhúsi› ella Rei›arafelagi›? — fleiri av limum teirra høvdu ikki veri› ta›, teir eru í dag, um landi› ikki bjarga›i bankunum ella veitti ve›hald. Eru teir líka kategoriskt ímóti landsinnblandan, sum Fólkaflokkurin letst vera? Hvat siga menn, i› sita umbor› á trolarum, i› ongantí› høvdu veri› komnir uttan landskassave›hald? Er landsinnblandan altí› av tí illa?

Stóri almenni parturin í føroyskum vinnulívi er ikki tí, at politikarar hava vilja› ta› so. Talan hevur veri› um krepputoysnir, hvørja fer› ta› hevur sta›i› á. Livst so spyrst, men naiva og — tá hugsa› ver›ur um fólkafloksforeringar úr landskassanum hettar valskei›i› — heldur dupultmoralska ásko›anin hjá Bjarna Djurholm er søguliga sæ› fundera› á mórubotn.

Sosialurin

N†GGJAR BØKUR

Tríggjar n‡ggjar barnabøkur



Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givi› út 3 bøkur:

Myndabókina ***»Lena og Pól«*** *eftir Anju Rieger*
Barnabókina ***»†r«*** *eftir Vivian L. Gu›mundsson.*
Annika Lávík myndpr‡ddi
Barnabókina ***»Smáttan í Stóraskógi«*** *eftir Lauru Ingalls Wilder. Garh Williams myndpr‡ddi*

»Lena og Pól« er litføgur myndabók, ætla› teimum smáu. Søgan er um tey bæ›i, smágentuna Lenu og Pól, spælibjørn hennara: Lena er so gó› vi› Pól, men Pól er ikki fegin um, hvussu Lena vísir honum kærleika og umsorgan. Ein dagin ger tann fri›arliga bjørnin av, at nú skal hon vísa Lenu, hvussu ta› er at ver›a dragsa›ur, tveittur og handfarin allan dagin...

»Lena og Pól« er 32 bls. í litum, bundin inn í stíva permu og kostar kr. 75. Niels Jákup Thomsen t‡ddi tekstin úr t‡skum. Spf. Hestprent stó› fyri prenttilger›ini.

»†r« er upprunaføroysk barnabók, ætla› at lesa fyri teim smáu. Høvu›spersónurin er †r, ein fitt 5 ára gomul genta, sum b‡r saman vi› mammu, pápa, tvíbur›abeiggjunum Rólvi og Grana og stórusystrini Drós onkusta›ni í Føroyum. †r hevur óføra gott hugflog. Hon spælir og finnur upp á alla tí›ina. Eitt kvøldi finnur pápin ein dunnuunga í gar›inum, og ta› dámar sjálvandi †r. Eina n‡ggja vinkonu fær hon eisini, tá i› Røskva kemur at fer›ast í grannahúsinum.

Bæ›i pápi og stórasystur siga søgur fyri †r, og solei›is ver›a eisini triggjar søgur í søguni: Um vættrarnar Snurra og Vupp, um eingilin Andras, og um tá i› abbin var smádrongur.

†r er 68 bls. vi› litmyndum, bundin inn í stíva permu og kostar kr. 95. Hestprent stó› fyri prenttilger›ini.

»Smáttan í Stóraskógi« er fyrsta av heimsgitnu »Smáttu-bókunum« hjá Lauru Ingalls Wilder (1867-1957), sum komu fyrstu fer› 1932-43. Høvundurin var tá 65 ára gomul. Í átta ævisøgukendum bókum l‡sir hon barndómsárini, fyrst í Wisconsin og seinni á preriuni, slættlendinum í Mi›vestri. Í 1953 var› øll rø›in endurútgivin vi› tekningum Garth Williams, og í hesum líki eru bøkurnar t‡ddar og givnar út um allan heimin.

Í »Smáttuni í Stóraskógi« lesa vit um smágentuna Lauru, stórisystir Mary og lítlusystir Káru, i› búgva saman vi› mammu og pápa í Stóraskógi í Wisconsin. Smáttan er umgird av skógi, og har eru nógv vill d‡r, bæ›i revar, hjørtir, íkornar, bjarnir og úlvar. Lívi› er eitt vaks at lívbjarga sær, og tær smáu genturnar noy›ast at hjálpa, so frægt tær eru mentar. Og alla tí›ina er vandi á fer›, t.d. tá i› bjarnir og úlvar koma at vitja.

Men um kvøldi›, tá i› lampan er tendra›, og húsfólki› sessast vi› eldsta›in, er fri›ur og hugni. Pápin tekur mangan fiólina fram, spælir og syngur, og so dugir hann eisini so væl at siga frá spennandi søgum.

Lærarar á ársskei›i á Føroyamálsdeildini í 1972-73 t‡ddu »Smáttuna í Stóraskógi«. Teir eru Ole Jacob Nielsen, Gu›ri› Helmsdal, Páll Sivertsen, Óla Jacob Jacobsen og Rólant Lenvig. Veglei›ari var Jóhan Hendrik Winther Poulsen. Rólant Lenvig hevur nú greitt handriti› til prentingar.

»Smáttan í Stóraskógi« er 178 bls. og kostar kr. 130 heft. Í komandi viku ver›ur hon eisini at fáa innbundin, og tá kostar hon kr. 170. Pf. Einars prent hevur sett, umbroti›, prenta› og bundi› inn.



Sosialurin

Sosialurin
Stovna›ur: 1927
Ábyrgdarbla›stjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Bla›stjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tí›indalei›ari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

Markna›ardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Dagbjørt S. Hansen dagbjort@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

Bla›fólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Ey›un Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turi› Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

Útgevari/uppseting:
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmi›stø›in

Avgrei›sla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Bla›i› ver›ur prenta› mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

L‡singar

Freistir:	Tekstl‡singar	Størri l‡singar	L‡singartorgi›	Heilsanir
T‡sdagsbla›i›	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsbla›i›	T‡s. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsbla›i›	Mik. kl. 10	T‡s. kl. 15	T‡s. kl. 12	T‡s. kl. 12
Fríggjadagsbla›i›	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsbla›i›	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri l‡singar, sum nógv arbei›i stendst av, mugu vera inni í gó›ari tí› og á›renn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbi›jast í gó›ari tí›.

Stødd:
Ein heil si›a í Sosialinum er 254mm brei› og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmi› millum teigarnar er 4mm.

Bjarni Djurholm: Eg eri púra paff

– Eg hev›i ikki vænta›, at eg skuldi blíva ákærdur fyri bæ›i eitt og anna› fyri ta› um eg havi sent fakfeløgunum eitt uppskot til ummælis, sigur Bjarni Djurholm, landsst‡risma›ur í vinnumálum

ARBEI‹S-MARKNA‹UR
Áki Bertholdsen

Bjarni Djurholm, landsst‡risma›ur í vinnumálin er heilt ovfarin av atfinningunum, hann hevur fingi› frá teimum føroysku fakfeløgunum teir seinastu dagarnar.

Fyri fjúrtan døgum sí›ani sendi hann fakfeløgunum eitt n‡tt uppskot til ummælis um, hvussu ósemjur á arbei›smarkna›inum skulu loysast hereftir.

Men ta› skerst ikki burtur, at aftursvari› frá fakfeløgunum hevur veri› ógvuliga avgjørt

– Eg hev›i ikki vænta› at eg skuldi blíva hegla›ur ígjøgnum og ákærdur fyri bæ›i eitt og anna›, bara tí at eg sendi fakfeløgunum eitt uppskot til ummælis, sigur Bjarni Djurholm.

Hann sigur, at ta›, sum fakfeløgini hava gjørt, er at leggja hann undir at hava ætlanir, sum hann ikki hevur og, sum fullkomiliga eru tiknar úr leysum lofti.

Fakfeløgini hava m.a. skuldsett Bjarna Djurholm fyri at provokera fakfeløgini og fyri at vilja taka grundleggjandi rættindi frá feløgunum, nevniliga rættin til at samrá›ast og rættin til at fara í verkfall.

Ta›, sum fakfeløgini sipa til, er í stuttum, at eftir n‡ggja uppskotinum, fær semingsstovnurin í vissum førum heimild til at útseta arbei›sste›gir.

Somulei›is fer ta› hereftir at ver›a truplari hjá fakfeløgunum at vraka eitt semingsuppskot.

Fakfeløgini átala eisini, at Vinnumálast‡ri› ætlar at smoyggja n‡ggjar reglar ni›uryvir høvdi› á arbei›smarkna›inum vi› lóg - reglur, sum arbei›smarkna›urin ikki vil vita av.

Bjarni Djurholm sigur, at fakfeløgini hava bæ›i miskilt og yvirtulka ætlanirnar í uppskotinum.

– Eg havi als ongar ætlanir um at smoyggja naka› ni›uryvir høvdi› á nøkrum. Ta› er júst tí, at eg havi sent feløgunum uppskoti› til ummælis.

Hann vísir á, at hann hevur sent álei› 50 fakfeløgum, áhugafeløgum og stovnum, uppskoti› til ummælis, júst fyri at tey kundu fáa høvi› til at siga sína hugsan um ta›.

– Solei›is fer ein ikki fram, i› ætlar at smoyggja naka› ni›uryvir høvdi› á nøkrum, leggur hann afturat.

Hann sigur, at vi›merkingarnar, sum nú eru komnar, ver›a nú kanna›ar og vi›gjørdar, og so ver›ur hugt eftir, hvat kann or›ast ø›rvísi, og, hvussu uppskoti› kann tillagast, fyri at sleppa undan misskiljingum.

Ste›ga›i

Bjarni Djurholm sigur, at ta› Óli Jacobsen, sum tá var landsst‡risma›ur, sum á sinni skuldi seta eina nevnd at gera uppskot til eina n‡ggja lóg um seming. Men Løgtingsval kom ímillum og tí ste›ga›i máli›. Tá i› Finnbogi Arge var› landsst‡risma›ur, setti hann nevndina vi› umbo›um fyri arbei›smarkna›in.

– Hendan nevndin kom so miki› langt, at hon var› samd um høvu›stættirnar í einum uppskoti. Men máli› ste›ga›i einafer› afturat, tí ósemja tók seg upp ímillum fakfeløgini og fíggjarmálast‡ri› um sams‡ning til nevndarlimirnar.

Bjarni Djurholm sigur, at tá i› hann tók vi› sum landsst‡risma›ur, setti hann sær fyri at lata embætisverki› í vinnumálast‡rinum fullføra arbei›i›.

– Men júst tí, at fakfeløgini ikki hava havt ávirkan á ta› lidna uppskoti›, hava vit sent teimum ta› til ummælis, sigur landsst‡risma›urin.

– Vilja fakfeløgini ikki hava vi›urskiftini á arbei›smarkna›inum samskipa›, so má eg umhugsa um ikki stø›an skal vera óbroytt, og alt skal vera, sum ta› hevur veri›, sigur Bjarni Djurholm, eftir hør›u atfinningarnar frá fakfeløgunum.

ma›urin.

Tí kemur ta› púra óvart á hann, at fakfeløgini eru so avgjørd og ákærandi í sínum aftursvari.

Kundu tit ikki ísta›in syrgt fyri at semja fekst ímillum Fíggjarmálast‡ri› og feløgini um nevndarsams‡ningarnar?

– Ta› er ikki eitt mál, sum liggur undir Vinnumálast‡rinum. Men fyri ta›, um ósemja tekur seg upp ímillum eitt ávíst st‡ri og ymsar partar í samfelagnum, so kunnu øll hini st‡rini ikki halda uppat at virka fyri ta›.

Má umhugsa stø›una

Ta› skilst eisini á Bjarna Djurholm, at hann ætlar ikki at gera hetta máli› til eitt strí›smál millum seg og fakfeløgini sum so, og at hann ætlar ikki at trumfa uppskoti› fyri tingi›, solei›is sum ta› nú er or›a›, um mótstø›an frá fakfeløgunum er so hør›, sum tey hava lati› hann vita›.

– Nú fara vit at kanna vi›merkinganrar, sum eru komnar. Sí›ani fara vit at vita, hvussu uppskoti› kann lagast til. Men ver›ur mótstø›an frá fakfeløgunum líka hør›, eftir at ta› arbei›i› er li›ugt, sum hon er nú, so má eg umhugsa at lata máli› falla. Tí vilja partarnir á arbei›smarkna›inum ikki hava vi›urskiftini samskipa›, so má eg umhugsa um naka› skal gerast yvirhøvur, sigur Bjarni Djurholm.

Eg ætli ikki at skerja rættin hjá fakfeløgunum

–Ta› er púra ørt at siga, at ætlanin er at taka rættin frá fakfeløgunum at fara í verkfall, sigur Bjarni Djurholm.

ARBEI‹S-MARKNA‹UR
Áki Bertholdsen

– Eru fakfeløgini komin til ta ni›urstø›u, at ætlanin er at skerja teirra rættindi, hava tey fullkomiliga misskilt máli›.

Ta› sigur Bjarni Djurholm, Landsst‡risma›ur í vinnumálum.

Vit hava bi›i› hann um vi›merking til tær hør›u atfinningarnar, sum fakfeløgini hava ført fram ímóti uppskotinum, sum vinnumálast‡ri› hevur gjørt, um, hvussu ósemjur á arbei›smarkna›inum skulu loysast hereftir.

Sum hann grei›ir frá a›rasta›ni í bla›num, heldur hann, at fakfeløgini hava bæ›i miskilt og yvirtulka› ætlanina.

Fakfeløgini hava funnist hvassliga at landsst‡risma›ur í sínum, tí tey halda, at ætlanin hjá honum er at taka grundarlagi› undan fakfeløgunum vi› at skerja verkfalrsrættin og samrá›ingarrættin.

Men hesum vísir landsst‡risma›urin aftur.

– Framfer›in hjá fakfeløgunum í hesum máli kann reisa spurningin um, hvørta› er, sum ræ›ur í Føroyum, um ta› eru teir fólkavaldu politikarar, ella um ta› eru fakfeløg og a›rir áhugabólkar, sum rá›a, sigur Bjarni Djurholm, landsst‡risma›ur

– Ta› passar ikki, at ætlanin er at skerja rættindini hjá fakfeløgunum, tí ta› er als ikki ta›, sum liggur í kortinum. Hava fakfeløgini uppfata› uppskoti› solei›is, er ta› antin tí, at tey vilja uppfata ta› solei›is, ella tí, at ta› er ov illa or›a›.

– Og er uppskoti ov illa or›a›, skal ta› ikki taka okkum nógvar minuttir at rætta ta›, sigur Bjarni Djurholm.

– Er ta› so heldur ikki rætt, at eftir n‡ggja uppskotinum fær semingsstovnurin heimild til at útseta verkfall at kalla í ta› óendaliga?

– Nei, ta› er ikki rætt. Semingsma›urin fær heimild at útseta verkfall í tvær vikur. Men í heilt serligum gørum, tá i› samfelagslig vir›i eru í vanda, kann hann útseta verkfalli› í tvær vikur afturat.

Landsst‡risma›urin sigur, at lesa fakfeløgini ta› ø›rvísi, er uppskoti› helst ov illa or›a›, men ta› tekur ikki langa tí› at rætta ta›.

Hann leggur afturat, at eru ivamál um, hvørjar heimildir semingsma›urin skal hava, ella um atkvø›ugrei›slurnar í fakfeløgunum um semingsuppskot, ber ta› til at útgreina ta› meiri í uppskotinum, á›renn ta› ver›ur lagt fram.

– Er uppskoti› ov illa or›a›, skal eg taka skyldina uppá meg. Men so ber til at hyggja at tí, og at or›a› uppskoti› ø›rvísi, sigur Bjarni Djurholm.

Hann sigur, at lógin, sum í gildi nú, er frá 1928 og spurningurin er um ta› ikki er ney›ugt at dagføra hana.

– Í tí sambandi hava vit hugt eftir, hvussu vi›urskiftini eru í okkara grannalondum, Og eg haldi, at ta› er løgi›, at føroyski arbei›smarkna›urin ikki kann liva undir álei› somu treytum, sum arbei›smarkna›uin í grannalondunum ger, tí tey vera mett at vera ímillum heimsins bestu samfeløg.

Hvør ræ›ur í Føroyum?

Bjarni Djurholm f‡list eisini á framfer›ina hjá fakfeløgunum, tí hann heldur, at ta› kann sáa iva um, hvør ta› er, sum ræ›ur í Føroyum.

– Fakfeløgini brúka hetta máli› at hótta politisku flokkarnar vi›, tí tey rógva uppundir, at teir flokkar, sum atkvø›a ímóti hesum uppskotinum, skulu fáa stu›ul frá feløgunum á næsta vali.

– Spurningurin er, hvør ta› er, sum ræ›ur í Føroyum, antin ta› eru teir fólkavaldu politikararnir, ella um ta› eru fakfeløgini og a›rir áhugabólkar, sum rá›a.

Hann sigur, at hansara uppgáva er at or›a lógaruppskot, og ta› hevur hann gjørt í hesum føri.

– Og tá i› uppskoti› er or›a›, er ta› sent teimum til hoyringar, sum ta› ávirkar. Og ta› haldi eg, er í fullum samljó›i vi› tær demokratisku mannagongdir, sum eru, sigur Bjarni Djurholm.